## Watson bjargar heiminum



The Guardian hevur sett eitt panel at gera ein lista yvir 50 fólkum, sum kunnu bjarga heiminum. Millum hesi hálvthundrað eru fleir kend nøvn. Angela Merkel, Leonardo di Caprio, Bjørn Lomborg og Al Gore eru nøkur teirra. Ein annar, sum føroyingar kanska ikki meta sum nakran frelsara, er Paul Watson. 57 ára gamli Paul Watson er, sambært The Guardian, tan maðurin, japanskir hvalaveiðumenn og kanadiskir kópaveiðumenn óttast mest.

## Bílagt 100 flogfør

Arabiska flogfelagið Dubai Aerospace Enterprice hevur bílagt ikki færri enn 100 nýggj flogfør frá amerikonsku flogverksmiðjuni Boeing. Talan er um 70 flogfør av slagnum Boeing-737, 15 av slagnum Boeing-787, 10 av slagnum Boeing-300ER og 5 flutningsflogfør av slagnum Boeing 747-8. Keyppprísurin er 10,9 mia. dollarar. Sum skilst skal eitt undirfelag hjá DAE eiga flogførini og síðani leiga øðrum flogfeløgum tey.




# Blind sakna vallistar á ljóðfløgu

**Sum er, eru vallistarnir nærum loyniligir fyri nógvar av blindu veljararnum. Ynskiligt hevði verið, um flokkarnir góvu vallistarnir út á ljóðfløgu, so tey blindu hava sama møguleika at kunna seg, tá tey skulu seta krossin, halda tey á Blindastovninum**

VAL 08
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Hóast brææatkvøða er ein møguleiki, vilja blindir veljarar sjálvsagt helst sleppa at uppliva stemningin á valstaðnum, vísa tey á Blindastovni Føroya á*

Nú vallistarnir til Løgtingsvalið verða kunngjørdir, eru tey nøkur, sum í ávísan mun kenna seg við sviðið so. Nógvir blindir veljarar hava nevniliga lítlan og ongan møguleika at sita í frið og náðum og kunna seg um valevnini á teimum ymsu listunum.

### Skráir og listar á ljóðfløgu

Hetta er nakað av tí, ið er komið fram, nú Ráðið fyri Brekað varpar ljós á møguleikan hjá teimum brekaðu at kunna seg politiskt, nú tað stundar til val.

Í teimum førum, har vallistarnir eru komnir á heimasíðurnar hjá flokkunum, hava tey blindu, ið nýta teldu og lesiforrit, ikki stórvegis trupulleikar. Um tey eru haldarar av netútgávuni av bløðunum, hava tey eisini møguleika at fylgja orðaskiftinum har við hjálp frá lesiforritinum

Hinvegin eru tað framvegis nógv blind, ið ikki nýta teldu, vísir Blindastovnurin á. Sum er, hava hesi fáar aðrar møguleikar enn at fáa onkran at lesa listarnar upp fyri seg og so vóna, at tey minnast, hvør er uppstillaður. Tí hevði tað verið ynskiligt, um vallistarnir vórðu givnir út á ljóðfløgu, sum tey sjálvi kunnu sita við.

Sama skilið er sjálvsagt við skrivliga valtilfarinum, ið bert verður sent við postinum. Eisini her hevði tað bøtt munandi um støðuna, um flokkarnir lósu eitt nú sínar stevnuskráir inn á ljóðfløgu við atliti til tey blindu og sjónveiku, halda brúkarar á Blindastovninum.

### Spell at raka við síðuna av

Eisini á sjálvum valstaðnum renna nógv blind seg í óhepnar forðingar. Gamaní hava tey rætt til at fáa hjálp at velja frá fólki á valstaðnum, men tá er ikki lætt at hava valið loyniligt, vísa tey á Blindastovninum á.

Sjálvi hava tey spælt sær við tankan um at gera eina skabelón, ið tey kunnu leggja yvir vallistan, og síðani seta krossin við at telja út frá listanum, sum tey hava kunnað seg um heimanífrá. Men, sum ein av brúkarnum á Blindastovninum vísir á,

- Skjótt er at telja skeivt, og tá er tað harmiligt, at hava rakt við síðuna av vallevninum, sum tú ætlaði at velja.

### Brævatkvøða ein møgulig loysn

À Blindastovninum minna tey á, at ein avleiðing av slíkum tvørleikum er, at nógv blind og sjónveik velja at atkvøða við brævatkvøðu. Á tann hátt kunnu tey sita við sínum lesiglasið ella lesitóli og avgreiða valið sjálvi. Nógv eru tó hørm um, at tey tá verða snýtt fyri stemningin á valstaðnum og fyri kensluna av, at valdagurin er ein heilt serligur dagur.

Annars halda tey, at tey blindu er væl tryggjaði í vallógini. Sambært henni, hava tey nevniliga møguleika til sjálvi at velja sær eitt fylgisfólk við inn at seta krossin, og er hetta ein møguleiki, alsamt fleiri blind og sjónveik, brúka.

Hóast ymiskt er eftir at ynskja sær, eru tey á Blindastovninum sum heild væl nøgd við heimasíðurnar hjá teimum ymsu politisku flokkunum. Samanumtikið eru síðurnar lættar at finna runt í, og tað er sjáldan nakað stórvegis, ið ørkymlar á sama hátt, sum á nógvum øðrum heimasíðum.

# Brekað skulu sjálvi seta krossin

**Fyri Ráðið fyri Breka er tað eitt sera prinsipielt mál, at eisini tey við skerdum førleikum sjálvi sleppa at seta krossin har tey ynskja**

VAL 08
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

At velja sína politisku umboðan, er ein tann mest grundleggjandi møguleikin, borgarin hevur at útinna og ávirka fólkaræði. Tí mugu skerdir førleikar á ongan hátt skerja møguleikarnar hjá brekaðum at kunna seg í valstríðnum ella koma til valstøðini, staðfestir Barbara á Tjaldrafløtti, forkvinna í Ráðnum fyri Brekað.

### Atgongd til valhølini

Við hesum í huga varpar Ráðið fyri Brekað nú ljós á møguleikan hjá brekaðum at at taka og vísa sína politisku støðu, nú tað stundar til løgtingsval.

Herfyri heitti ráðið á Føroya Kommunufelag um at tryggja, at allir veljarar, í so stóran mun sum gjørligt, hava møguleika sjálvi at koma inn í valhølið at seta krossin. Í áheitanini vísir ráðið á, at eitt nú í Norra hava tey gjørt nógv burturúr at vegleiða valstøðini, so atgongdin verður so høgligt, sum til ber. Tey skjóta tí upp, at føroysku valstøðini brúka hesa norsku vegleiðingina sum íblástur. Hetta fekk millum annað Vestamanna Kommunu at flyta valstaðið frá skúlanum til ítróttarhøllina, ið betur lýkur krøvini um, at hurðar mugu verða nóg breiðar til fólk í koyristóli, at parkeringspláss til brekað eru tøk, og líknandi.

### Rætt til at kunna seg

Fysiskir karmar eru tó ikki tað einasta, ið kunnu gera tað tvørligt hjá brekaðum at gera sína valatkvøðu galdandi. Serliga fyri blind og deyv kann tað vera rættiliga trupult at fylgja við í orðaskiftinum upp undir val, og harvið takað avgerð um, hvønn tey skulu velja. Tað er til dømis sera sjáldan, at deyvatulkar verða brúktir í valsendingum í sjónvarpinum. Eisini eru tey blindu og sjónveiku, ið ikki brúka lesiforrit til teldu, støðugt bundin av, at onnur lesa skrivliga valtilfarið fyri teimum.

Fyribils hevur Ráðið fyr Brekað heitt millum annað Blindafelagið og Deyvafelagið um at lýsa sína støðu og annars roynt at stimbra til eitt breitt orðaskifti um evnið. Tað er tó ikki óhugsandi, at ráðið fer at venda sær beinleiðis til politisku flokkarnar og heita á teir at hava tey við skerdum førleikum í huga, nú valstríðið av álvara byrjar, sigur Barbara á Tjaldrafløtti, forkvinna í Ráðnum fyri Brekað.



*Skerdir førleikar eiga á ongan hátt at skerja møguleikarnar hjá summum fólkum at fylgja við í politiska orðaskiftinum, sigur Barbara á Tjaldrafløtti, forkvinna í Ráðnum fyri Brekað*